# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 20 ár síðan Erlendur Patursson doyði

Í dag, 16. juni eru 20 ár liðin síðan ein av okkara kendasu politikarum, Erlendur Patursson í Kirkjubø, doyði, 72 ára gamal.

Erlendur var útbúgvin hagfrøðingur (cand polit). Hann kom fyrstu ferð inn á ting fyri Tjóðveldisflokkin í Sandoyar valdømi í 1954 og fall á valinum í 1966. Í 1970 varð hann aftur valdur á ting fyri Tjóðveldisflokkin í Suðurstreymoyar valdømi, tá hann setti met við fleiri enn 800 atkvøðum atkvøðum og sat á tingi til hann doyði í 1986. Hann var landsstýrismaður frá 1963-67 og sat á Fólkatingi frá 1973-77.

Hann var formaður Tjóðveldisfloksins næstan øll árini og blaðstjóri á floksblaðnum 14. September. Erlendur skrivaði eisini fleiri bøkur og fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri yrkisbókmentir í 1981.



*Í dag eru 20 ár síðani Erlendur Patursson doyði. Hann var tingmaður í 24*

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar:

## Meiri enn 700 sjúkrarøktarfrøðingar fáa høvi at siga sína hugsan

**Í hesum døgum fáa meiri enn 700 sjúkrarøktarfrøðingar kring landið eitt spurnarblað sendandi við postinum. Spurningarnir fevna so vítt sum formlig setanarviðurskifti, strongd, ávirkan á arbeiðsumstøður og menning**

TÍÐINDASKRIV



*Nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, f.v.: Maria Debess, Jana H. Dalsgaard, Hervør Eidesgaard, Elsa Vest, Turið Zachariassen, Joan Ziskason, Jonna Hansen og Einar Klakkstein*

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur tikið stig til at seta eina trivnaðarkanning í verk millum føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar. Limirnir í felagnum starvast víða innan heilsuøki - á sjúkrahúsunum, á røktar- og ellisheimum, í sambýlum, innan heimarøktina, innan heilsurøktina og við undirvísing og ráðgeving. Felagið ynskir at fáa eina heildarmynd av, hvussu sjúkrarøktafrøðingar trívast í teirra arbeiði og um trivnaðurin møguliga er broyttur seinnu árini.

Sparingar, yvirtøkur av viðgerðum, umleggingar og broytingar innan heilsuverkið eru týðandi orsøkir til, at felagið heldur, at tørvur er á einari tílíkari kanning. Tíðin til sjúklingin/brúkarin er vorðin styttri og størri krøv verða sett til tvørfakligt arbeiði, menning og samskipan av uppgávunum.

Harafturat broytist samfelagið við rúkandi ferð. Hetta setur krøv til støðuga førleikamenning samstundis sum sjúklingurin/brúkarin eisini er vorðin meiri tilvitaður um sín egna tørv. Hetta setir eisini nýggj og avbjóðandi krøv til tær uppgávur, sum sjúkarøktarfrøðingar røkja innan heilsuverkið. Nøktandi førleiki, góðir møguleikar fyri menning og trivnaður í arbeiðinum eru tí av alstórum týdningi fyri starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Tað er Granskingardepilin fyri Økismenning, sum stendur fyri kanningini.

## Áhugin fyri náttúrulærugreinum skal mennast við lego



*Kurt Madsen vísir eitt dømi um ein legorobott*

**Áhugin fyri náttúrulærugreinum skal stimbrast við at byggja legorobottar. First Lego League skipar fyri kapping í at byggja robottar, og fleiri føroysk lið luttaka**

FIRST LEGO LEAGUE

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár var kunnandi fundur í Læraraskúlaauluni, har Kurt Madsen kunnaði næmingarnar um fyrireikingarnar til First Lego League, har fleiri føroyskir skúlar luttaka. Tilsamans eru fleiri enn 6000 luttakarar í FFL-kappingini, og úr Føroyum eru 17 lið meldað til kappingina. Tey skulu so kappast sína millum í ymsu londunum, um hvør teirra skal sleppa til FFL finaluna, sum verður í Svørríki seinni í ár.

Høvuðsendamálið við First Lego League er, at stimbra áhugan fyri náttúrulærugreininum og at geva børnum eina stuttliga upplivina við bólkaarbeiði og tøkni. Ætlanin er so, at tað eru luttakararnir sjálvir, sum skulu læra hvønn annan, og ikki lærarin, sum í vanligu undirvísingini.

Í First Lego League skulu næmingarnir byggja robottar úr lego. Hesir robottar skulu so klára at gera nakrar uppgávur, og tað liðið, sum eigur besta robottin, verður heiðra við virðisløn. Men kappast verður eisini á øðrum økjum, millum annað sniðgeving og framførðslu.

Kappingin er fyri børn í millum 10 og 16 ár, og eru tað børn í Danmark, Noreg og Svøríki, sum luttaka. Føroyar vóru í fjør við sum gestaluttakarar, tá trý lið úr Føroyum luttóku. Og í ár eru Grønland eisini við sum gestaluttakari.

Fyri 30 árum síðan:

## Lærarauprógv í 1976




*Í 1976 fingu 20 nýggir lærarar prógv á Føroya Læraraskúla. Á myndini eru aftast f.v.: Janus Jensen, Suni Jacobsen, Per Gaard, Kjartan Clementsen, Árant Olsen, Leon Johannesen, Alexander Kristiansen, Magnus Hansen, Elmar Jacobsen, Richard Johannesen og Heri Thorsteinsson.*
*Fremra rað f.v.: Oddvá Nattestad, Emma Jacobsen, Hanna Kampmann, Ingvør Joensen, Inga Høgenni, Hansina Husgaard, Anna Gásadal, Anna Thomsen og Sólbjørn Mortensen.*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1976*

Lesið Sosialin - so eru tit við